## Brúnsveins vísa

1. “Hoyr tað, Mjøllhvít, svara mær blítt!
   *– með junga –*
   eg ríði í lund at biðja mær vív.”

   *Alfagurt ljóðar mín tunga,*
   *lystir meg í dans at gá með junga,*
   *brúnt er mítt silkihár,*
   *mjøllhvít so eri eg sjálv.*
   *Alfagurt ljóðar mín tunga.*

2. “Hvat heldur tú biður tær konu ella kvinnu
   Kristi lati teg hana við æru vinna

3. Hvat heldur tú biður tær konu ella moy
   Kristi lati tygur bæði við æru doy’

4. Hoyr tað, Brúnsvein, søti mín
   má eg ikki fara í brúdleyp títt?”

5. “Skaltú í mítt brúdleyp fara
   tú mátti ikki mikið reyðargull hava.”

6. “Mítt reyðargull kann eg væl bera
   tað havi eg fingið við heiður og æru.”

7. Brúnsvein reið seg undir oy
   festi sær so væna moy.

8. Festi frúgvu og flutti heim
   so ger mangur dansisvein

9. So førdu teir brúður í Brúnsveins garð
   tað var ikki gull fyri leikarar spart

10. Fylgdu tey brúður í brúðarhús
    fram gekk Mjøllhvít, bar fram ljús

11. Settu tey brúður í brúðarbonk
    fram gekk Mjøllhvítt, bar fram skonk

12. Skonkti mjøð av harmi
    tárini runnu í barmin

13. “Hvat er tað fyri væna vív
    í aftan skeinkir mjøð og vín?”

14. “Tað er mín yngsta systir
    nýkomin út av kloystri.”

15. “Aldri sá eg nakað kloystravív
    fella so møðug tár á lín.

16. Aldri sá eg nakað kloystrabarn
    fella so møðug tár utan harm.

17. Tað dugir ei at dylja
    tað man vera tín hetja.

18. Hav tú sjálv títt slegfriðvív
    flyt meg aftur til faðir mín

19. Meira gull ber hon á sær
    enn mín faðir lat fylgja mær

20. Meira gull ber hon fyri brósti
    enn eg eigi í míni kistu

21. Meira gull ber hon á hond
    enn mín faðir eigir ríki og lond

22. Tríggjar giftur hevur faðir meg gift
    og allar hava mær heljur skift.”